# Oljufýrar ikki loyvdir eftir 2015

**TILMÆLI** Hitapumpur og fjarhiti skulu í mest møguligan mun avloysa núverandi olju- og gassfýrar í donskum íbúðum innan 2050. Frá 2015 verður bannað at seta upp nýggjar oljufýrar.

Snorri Brend

**Danmark:** Hetta er eitt av tilmælunum í frágreiðingini hjá Veðurlagsnevndini, ið varð almannakunngjørd herfyri.

Í frágreiðingini verður dentur lagdur á, at tað longu í dag í mongum førum loysir seg at leggja um frá oljufýrum til hitapumpur.

Í hesum sambandi hevði eitt uppskot um at økja avgjøldini á fossilum brennievnum stuðlað upp aftur meira uppundir eitt skifti til hitapumpu.

– Vantandi kunning og álit á, at prísurin á olju fer at hækka, kann fáa onkran at keypa sær ein nýggjan oljufýr. Tá summir oljufýrar halda leingi, er lítið høpi í, at nýggir oljufýrar verða settir upp eftir ein ávísan dag, stendur í frágreiðingini, sum mælir til, at oljufýrurin verður bannaður um fimm ár.

Eisini gassfýrar skulu útfasast innan 2050, tí yvirskipaða uppgávan hjá Veðurlagsnevndini hevur verið at finna orkukeldur, sum eru óheftar av koli, olju og jarðgassi.

Men frágreiðingin setir ikki dato á, nær síðsti gassfýrurin kann setast upp.

Men frágreiðingin sigur, at gasskundar, ið hava íbindingarskyldu til jarðgass, skulu loysast frá hesi skyldu, til tess at gera tað lættari at skifta til aðra orkuskipan.

Til tess at fyribyrgja, at privat húsarhald í stórum tali bert skifta olju- ella gassfýr sín út við ein biobrennifýr, har brennievnið er avgjaldsfrítt, mælir frágreiðingin til, at stuðul verður veittur til uppsetan av hitapumpum og/ella at avgjald verður sett á biobrennievni.




*Danska Veðurlagsnevndin mælir til at banna oljufýrum í Danmark eftir 2015 til fyrimuns fyri hitapumpum*




*Orkuverkið við Avedøre, sunnanfyri Keypmannahavn er eitt av teimum mongu orkuverkunum í Danmark*

# Út við koli – inn við biomassa

**ORKA** - Orkuverkini í stóru býunum í Danmark skulu nú brúka biomassa ístaðin fyri kol. Tað sigur danski orkumálaráðharrin, Lykke Friis við Jyllands Posten.

Snorri Brend

**Danmark:** Sambært ætlanunum hjá stjórnini, verður longu næsta ár farið undir at skifta kolið út við biomassa (lívfrøðiligt tilfeingi) á seks støðum: Í Keypmannahavn, Aalborg, Esbjerg, Aarhus, Odense og í Tríkantsøkinum í Jyllandi.

Stjórnin vónar á henda hátt at kunna skerja danska CO2-útlátið við 3-5 prosentum.

– Ein stórur partur av ætlanini hjá stjórnini at gera okkum óheft av fossilum brennievnum, snýr seg um biomassa. Á henda hátt ætla vit at skerja CO2-útlát okkara við 2-3 mió tonsum um árið, sigur Lykke Friis.

Hetta merkir, at danska nýtslan av biomassa skal økjast við 50 %, sum fyrst og fremst skal fáast til vega úr Baltikum, Russlandi og Kanada.

Lykke Friis leggur dent á, at ætlanirnar skulu setast í verk skjótast gjørligt. Um ikki í 2011 so í øllum førum í 2012.

Ætlanin er partur av samlaðu orkustrategiini hjá stjórnini, sum ráðharrin fer at leggja fram seinni í ár.

## Ber til

Sambært stjóranum í Dansk Energi, Lars Aagard, er talan um eina framsøkna verkætlan, sum lættliga kann umsetast til veruleika.

– Hetta er ein realistisk ætlan, tí orkuverkini bert skulu fremja smáar umbyggingar til tess at kunna fara frá koli til biomassa. Neyðugt verður hvørki at leggja nýggjar kaðalar ella byggja nýggjar transformatorstøðir, sum um útbygt varð við tildømis vindi.

– Tí kann hetta eisini fremjast uttan at áleggja brúkarunum eyka útreiðslur, sigur hann við Jyllands Posten.

Sambært blaðnum er tað eisini ætlanin hjá ráðharranum, at brúkararnir ikki skulu rinda nakað. Ríkiskassin ber útreiðslurnar av, at farið verður frá koli til biomassa.

Ætlanin fær tó ikki fulla undirtøku í Fólkatinginum. Eindarlistin heldur, at rættari er at dúva uppá vindmyllurnar og menning av nýggjari tøkni. Flokkurin stúrir fyri, at lívfrøðiliga tilfeingið verður ov dýrt, tí ov lítið er til av tí.

Hesum sjónarmiði tekur forkvinnan í Veðurlagsnevndini hjá stjórnini, Katherine Richardson, undir við.

– Biomassi er ikki ein varandi loysn. Um 10-20 ár fer prísurin á biomassa at vera so høgur, at vit ikki fara at kunna fáa fatur á tí fyri tann prísin, vit vilja rinda.

– Ið hvussu er ikki, um vit vilja brúka tað sum høvuðs orkukeldu, sigur Katherine Richardson við Ritzau-tíðindastovuna.

Hon vísir á, at meginparturin av viðabulunum, sum í dag verða brúktir í donsku orkuhitaverkunum - 87 prosent - er innfluttur.

– Tí skulu vit ansa okkum við at dúva ov nógv og einvíst uppá biomassa í framtíðini. Vit skulu brúka tað sum back-up til aðrar orkukeldur, men vit kunnu ikki koma uttanum vindmyllur og aðrar alternativar orkukeldur, sigur Katherine Richardson.

Hon vísir eisini á, at sjálvt um stór orkuhitaverk eftir stuttari tíð leggja um til biomassa, so kunnu tey lættliga fara aftur til kol, tá prísurin á biomassa verður ov høgur.

– Vit kunnu fáa nakrar royndir nú við at skifta til biomassa, men biomassi er ein avmarkað orkukelda, sigur Katherine Richardson.